FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
Faroe Islands Fisheries Inspection

# Ófulltikin dekkari til Fiskiveiðieftirlitið

Eitt starv sum ófulltikin dekkari á skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst.

Ert tú ung/ungur, og hevur hug til arbeiði umborð á skipi, er hetta ein góður møguleiki.

Starvstíðin sum ófulltikin dekkari, telur á sama hátt sum starvstíð við handilsskipum

Arbeiðið umfatar at ganga vakt, og annars taka lut í vanligum skipsarbeiði.

**Førleikakrøv:**

- Heilsuváttan fyri sjófólk. Uttan avmarkingar og skikkaður til kagtænastu.
- Fyrimunur er við gildugum trygdarskeiðsprógvi.

Setanin sum ófulltikin dekkari er avmarkað til tvey ár.

Starvið sum ófulltikin dekkari verður sett sum skjótast.

Setanartreytir og løn eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið er Fiskimálaráðið og stovnar undir tí. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið.

Skrivlig umsókn við: CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 19. mars 2009 kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til:

Fiskiveiðieftirlitið
Heykavegur 6
Postsmoga 347
110 Tórshavn

*Nærri upplýsingar um størvini, kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 31 10 65 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara. www.fve.fo*

CISV
faroe islands
building global friendship

## Aðalfundur

Aðalfundur verður leygardagin 21. mars kl. 14.00.

Fundarstaðið verður lýst seinni.

**CISV Altjóða Barnalegur**
cisv-fo@olivant.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!

**Havnar Handverkarafelag**
Stoffalág 60 · Box 203 · FO-110 Tórshavn

## Frá Havnar Handverkarafelag og Eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelags

**Ársaðalfundurin verður mánadagin 23. mars 2009 kl. 19.00 á Hotel Hafnia.**

**Skrá samb. § 25 í lógini:**

1. Val av orðstýrara
2. Frágreiðing frá farna árinum.
3. Roknskapur til góðkenningar.
4. Innkomin mál. Limagjaldið/lívstryggingin.
5. Val av nevnd
6. Val av tveimum grannskoðarum
7. Ymiskt

**Aftaná aðalfundin verður aðalfundur í Eftirlønargrunninum við hesi skrá:**

**Skrá samb. § 8 í viðtøkunum:**

A. Val av orðstýrara
B. Frágreiðing frá nevndini um virki grunnsins í farna ári
C. Framløga og góðkenning av roknskapi og fíggjarstøðu
D. Støða verður tikin til, hvat gerast skal við møguligt avlop ella hall
E. Val av nevndarlimum
F. Val av grannskoðara
G. Møgulig mál frá nevnd/limum
Viðtøkubroytingar orsakað av herdum krøvum til grundarfæfeingi/basiskapital í nýggju løgtingslógini um tryggingarvirksemi.
Á skrivstovu grunsins, Stoffalág 60, Tórshavn, liggur fundarskráin og fullfíggjað uppskot til viðtøkubroytingar.

*Sí lýsing á www.handverk.fo*
**Havnar Handverkarafelag**

# Norðurlendskur týðarastuðul

Stuðul til at týða skaldskap úr føroyskum til annað norðurlendskt mál, er leysur at søkja.

Stuðul kann verða latin til at týða skaldsøgur, stuttsøgusøvn, yrkingar og yrkingasøvn, ævisøgur, ritroyndir og í summum førum annað tilfar t.d. vísindaritgerð ella fakbók av einumhvørjum slag, tó ikki skúlabøkur.

Umsóknarbløð fáast á www.nlh.fo, har reglurnar fyri studningsveitingini eisini eru at finna.

Seinasta freist at lata inn umsóknir í hesum umfarinum er 1. apríl.

**Nærri fæst at vita við at venda sær til Guðrun Gaard gudrung@kallnet.fo**

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

# Aðalfundur

Maskinmeistarafelagið hevur ársaðalfund

**leygardagin 7. mars kl. 14**

á Hotel Hafnia

**Skrá**

1. Val av fundarstjóra.
2. Frágreiðing formansins.
3. Leggja fram roknskap til góðkenningar.
4. Uppskot um lógarbroytingar.
5. Val av formanni, nevndarlimum og tiltakslimum.
6. Ásetan av limagjøldum.
7. Velja skrásettan grannskoðara.
8. Ymiskt.

**Uppstillaðir til formansvalið eru:**

- Páll Hansen og
- Jógvan Nybo

Aftaná fundin verður ábit.

**Nevndin**



*Eitt sindur hugnaligari...*

Hvat við at forkela teg sjálvan ella gleða onkran annan?

Tær góðu umstøðurnar kunnu vit bjóða tær.

Royn Luddastovu í Leynum ella Bakkastovu við Ljósá.

**BOOKING:**
**lp@ognir.fo ella tlf. 21 73 00**
**www.ognir.fo**

## Skrivstovuhøli søkist

Sóknast verður eftir góðum hølum til skrivstovu í Havn. Stødd uml. 40-100 m². Hølini mugu hava góð parkeringsviðurskifti og liggja væl fyri.

**Ring ella skriva til 211996 / kho@post.olivant.fo**